

*Føroya Jarðarráð vil ikki lata sær lynda, at Tórshavnar kommuna er farið undir at gera ein veg til skjótibreytina í Sandvíkum, uttan neyðugu heimildina frá Jarðarráðnum. Ráðið hevur tí sent boð eftir fútanum*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

# Jarðarráðið sendir fútan eftir Tórshavnar kommunu

**Føroya Jarðarráð vil ikki lata sær lynda, at Tórshavnar kommuna er farið undir at gera ein veg til skjótibreytina í Sandvíkum, uttan neyðugu heimildina frá Jarðarráðnum. Ráðið hevur tí sent boð eftir fútanum**

FÚTABOÐ
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*

– Tað kann samanberast við, at tú fert inn í ein urtagarð hjá einum øðrum húski og byrjar velta í urtagarðinum, uttan at tú hevur nakað sum helst at gera í urtagarðinum.

Elisabeth Eldevig er formaður í Føroya Jarðarráð, og hon er alt annað enn nøgd við leiklutin hjá Tórshavnar býráð í samband við vegagerðina til skjótibreytina í Sandvíkum í Havn. Føroya Jarðarráð hevur nú mist tolið við høvuðsstaðarkommununi, og hevur tí sent boð eftir fútanum fyri at steðga arbeiðinum.

### Einki loyvið

Málið um skjótibreytina í Sandvíkum er fleiri ára gamalt. Samgongan millum Fólkaflokkin og Sambandsflokkin samtykti herfyri, at skjótifelagið, Byrsumúli, skal fáa eina skjótibreyt í Sandvíkum. Í samband við skjótibreytina hevur Landsverk kravt av Tórshavnar býráð, at kommunan hevur eitt nøktandi vegasamband frá landsvegnum oman til skjótibreytina.

Tað er júst um hendan veg, at tvídráttur hevur tikið seg upp millum Tórshavnar býráð og Føroya Jarðarráð.

Fyri at lúka treytunum hjá Landsverki um nøktandi vegasamband til skjótibreytina heitti Tórshavnar býráð á Føroya Jarðarráð um Jarðarráðið kundi geva eina tilsøgn um jørð til vegagerðina. Áheitan frá Tórshavnar býráð varð gingin á møti, men kortini vórðu nakrar treytir settar høvuðsstaðarkommununi. Treytirnar frá Jarðarráðnum leyk Tórshavnar býráð ongantíð, og tí metir Føroya Jarðarráð, at sølan av jørðini ongantíð er komin í rættlag.

Føroya Jarðarráð varð tí tikið á bóli, tá tað frættist seinasta fríggjadag, at stúgvaðir lastbilar við gróti úr Berjabrekku vóru farnir at koyra grót út í Sandvíkar til vegagerðina.

– Vit bóðu Tórshavnar kommunu sjálvboðið steðga arbeiðinum alt fyri eitt, tí viðurskiftini millum okkum og kommununa eru ongantíð komin í rættlag, men arbeiðið helt kortini á. Tá kommunan sýtir fyri at steðga ólógligu vegagerðini, hava vit vent okkum til fútan fyri at steðga arbeiðinum við fútaforboði, sigur Elisabeth Eldevig, formaður í Føroya Jarðarráð.

### Vilja framskunda

Føroya Jarðarráð hevur fingið at vita frá fútanum, at málið kemur fyri tann 9. desember. Elisabeth Eldevig heldur, at hetta er í so long tíð til at viðgera málið, tí tá er vegagerðin komin væl áleiðis, og tí hevur Jarðarráðið heitt á fútan um at framskunda viðgerðina av málinum.

Vit royndu allan fyrrapartin at fáa fatur á borgarstjóranum, Jan Christiansen, til eina viðmerking, men tað eydnaðist tíverri ikki at fáa eina viðmerking frá honum um málið.

## Latið Amnesty-lutaseðil inn

Miðskeiðis í oktobermánaði varð ein lutaseðil frá Amnesty International Føroya Deild borin øllum húskjum í landinum saman við Vikublaðnum. Lutaseðilin er til frama fyri arbeiði felagsins.

Í tíðindaskrivi frá Amnesty International Føroya Deild verður boðað frá, at seinasti dagur at senda lutaseðilin inn er mikudagin 8. desember, og drigið verður mannarættindadagin 10. desember. Vinnararnir verða lýstir á heimasíðuni og í bløðunum í vikuni aftaná.

**.páll**

## Kári spyr um bussar

Løgtingsmaðurin, Kári P. Højgaard, hevur sent landsstýrismanninum í fíggjarmálum, Bárði Nielsen, ein munnligan fyrispurning um avgjaldið á smærri bussum til stovnar.

Løgtingslimurin hjá Sjálvsstýrisflokkinum vil hava at vita frá landsstýrismanninum, um hann heldur tað er rímuligt, at stovnar ella sambýli, har starvsfólk og aðrar góðar kreftir savna pening saman til ein buss, sum lættir um gerandisdagin hjá óhjálpnum og brekaðum, skulu gjalda fult avgjald til landskassan.

Kári P. Højgard vil eisini hava at vita um Bárður Nielsen hevur ætlanir um at taka stig til at broytingar á hesum øki.

**.páll**

## Lundin er liðug

Komandi sunnudag verður kirkjulundin uttanfyri Vesturkirkjuni loksins tikin í nýtslu.

Seinasta árið ella so hevur nógv verið grivið og grópað uttanfyri Vesturkirkjuni, og hóast nakað av putli er eftir, heldur kirkjuráðið í Vesturkirkjuni, at kirkjulundin nú er klár at taka í nýtlsu.

Í samband við, at arbeiðið við Kirkjulundini er liðugt, bjóðar kirkjuráðið til ein heitan kaffimun og køkur í kirkjukjallaranum, eftir gudstænastuna sunnudagin. Hvussu vælumtókt nýggja lundin verður fyri havnarborgararnar er ilt at siga, men millum villdunnur og síl verður økið væl vitjað, sigur kirkjuráðið í tíðindaskrivi.

**.páll**

## Bróta upp úr nýggjum

Seinastu mongu árini hevur Viðarlundin í Vestmanna skipað fyri stórum jólabingo í Ítróttarhøllini í Vestmanna. Hóast Jólabingoið fekk góða undirtøku, hevur Viðarlundsnevndin avgjørt at royna okkurt nýtt í ár.

Í tíðindaskrivi verður boðað frám at komandi sunnudag, 5. desember, verður stórt jólatiltak í ítróttar høllini. Á skránni verður burturluting av ymsum góðum jólamati, so sum ræst krov, dunnur, karamellur, rækjur o.a.

Fyri at fáa fram tann rætta jólahugnan kemur Vestmanna Kirkjukór at syngja, umframt at Magni Christiansen kemur at syngja jólaløg av nýggju fløgu hansara.

Tiltakið byrjar sunnudagin klokkan 16.00

**.páll**

# Alment ella privat - ikki bæði

TÍÐINDASKRIV
*Miflokkurin*

Tingmanning Miðfloksins heitir á politisku flokkarnar og Føroya Landsstýri um at vísa varsemi í málinum um Føroya Fiskavirking. Uppgáva politikkaranna er at velja nevndina í Framtaksgrunninum og skifta hana út, um hon ikki ger arbeiði sítt til lýtar. So leingi hendan situr, má politiska valdið vísa nevndini og tí av henni valda stjóra álit, og líta á, at hesi eru fult før fyri at røkja áhugamálini hjá eigarunum, sum er alt Føroya fólk. Í heilum at hótta við avleiðingum, um Fiskavirking ikki ger, sum teimum líkar, er ein sera ónøktandi støða fyri fyritøkuna. Ringasta avleiðingin kann vera, at útlendskir samstarvsfelagar missa álitið á fyritøkuna og ikki tora at gera bindandi avtalur, tí teir onga vissu hava fyri, hvussu fyritøkan sær út í framtíðini. Slíkur ótryggleiki, tilevnaður av politiskari íblandan, kann lætt oyðileggja prísstøðið og sostatt raka alt samfelagið.

Tí er týdningarmikið, at løgmaður, landsstýrismenn og løgtingslimir vanda sær um orðini, hesi hoyrast jú úti í heimi í somu løtu, tey eru søgd. At politiskar hóttanir harumframt eru við til at skapa ótryggleika hjá teimum 850 starvsfólkunum hjá Fiskavirking, er bara steinur oman á byrðu í teirra gerandisdegi.

Hetta skal ikki skiljast sum eitt mótmæli móti skipaðum einskiljingarætlanum. Men einskiljingartilgongdin av almennum fyritøkum eigur at vera merkt av gjøgnum-skygni, og at øll hava sama rætt at bjóða uppá partabrøvini.

**Jenis av Rana**
**Bill Justinussen**